VIÐMERKINGAR

# Heima situr svøltandi kráka

**Kjartan Kristiansen**



Í Starvsblaðnum nr. 9 í ár er rættiliga hvass-orðað ábreiðsla í móti Menningar-stovuni. Inni-haldið er viðkomandi, tí ábreiðslan nemur við nakrar av teimum avbjóðingum, sum vit í Føroyum mugu taka upp í enn størri mun enn higartil, nevniliga

- nýskapan og íverksetan
- alheimsgerð
- váðafúsan kapital.

Tíverri taka atfinningarnar í Starvs-blaðnum ikki nevndu avbjóðingar upp í tí álvara, sum er neyðugur, men leggja Menningarstovuna undir ómoralskar ætlanir.

Tí má ábreiðslan svarast gjølligari, enn tað gerst í einum minutti í útvarpinum.

Menningarstovan bjóðaði føroyskum fyri-tøkum á kunnandi fund um stovnan av vinnuligum virksemi í Baltalondum. Tey, sum lósu innbjóðingina, løgdu til merkis, at fundurin var ætlaður virkjum, ið arbeiða við ætlanum um at **víðka sítt virksemi** til tey Baltisku londini ella Eysturevropa.

Tað er ikki nakað nýtt, at føroysk virki royna at víðka sítt virksemi uttanlands. Fiskasølan í síni tíð, Vónin, AWI Boats og onnur hava gjørt tað, uttan at hetta hevur gingið út yvir føroysku arbeiðsplássini - heldur tvørtur í móti eru hesi styrkt.

Í flestu førum er tað betri marknaðar-atgongd, sum ger tað lønandi at víðka heimligt virksemi út um Føroyar. Forðingar í keypparalondum ella høgir flutnings-kostnaðir kunnu gera ein annars ólønsaman marknað lønsaman, og tað kann eisini verða lættari at veita viðlíka-halds- og umvælingar-tænastur, um virksemi verður sett á stovn nærri ella á marknaðinum. Í øllum førum styrkir virksemið uttanlands heimligu fyri-tøkuna.

Í øðrum førum kann betri og bíligari innkeyp vera áhugamálið. Nógv millumlið frá rávørumarknaðinum til føroyska marknaðin eru ikki altíð trygd fyri, at føroyski keyparin fær bestu vøru til sámuligastu prísirnar. Tá kann virksemi nærri framleiðslulandinum geva fyritøku heima ein fyrimun á føroyska marknaðinum. Tað gerst sterkari í kappingini heima, og tað er ikki ókent, at okkara fyritøkur hava brúkt síni styrktu innkeyp á okkara nærmarknaðum. Hvør skuldi trúð, at ein føroysk fyritøka kundi fara undir at selja dekk í Íslandi? Tað gjørdist ikki úr Føroyum, men við at seta virksemi á stovn í Íslandi, og virksemið heima er ikki vorðið verri fyri av tí.

Í triðja lagi kann virksemi, sum tað annars ikki er rúm fyri heima, verða sett á stovn uttanlands. Kappingin heima um rávøru, um dugnaliga arbeiðsmegi ella neyðuga tænastu kann gera tað meira lønsamt at víðka um virksemið hjá fyritøkuna uttanlands.

Sum tað skilst kunnu vera nógvar góðar grundir til at víðka virksemi hjá føroyskum fyritøkum við at stovna vinnuligt virksemi í øðrum londum.

Ein treyt er kortini fyri, at hetta kann eydnast, nevniliga at virkið heima er lønsamt og tí ført fyri at taka við avbjóðingini um nýskapan og alheimsgerð og tí eisini ført fyri at bjóða váðafúsum kapitali møguleika at fáa eins gott avkast sum í øðrum váða.

Føroyska samfelagið hevur eina tíð verið í einum búskaparligum aldudali. Við hvørt hevur mótfall kenst fremri í huganum enn áræði og hugur at royna nýggjar leiðir.

Vit á Menningarstovuni eru so heppin at hava rættiliga gott samstarv við føroyskt vinnulív og hava lagt til merkis eina jaliga gongd í nýskapan og íverksetan í samfelagnum. Tað hevði verið burturvið, um Menningarstovan ikki stuðlaði hesi gongd og ikki fekk til vega kunning, ið lætti um vegin og gjørdi váðar minni.

Vit eru eisini varug við, at hesar nýskapanir og íverksetanir hava eitt alheimsgjørt rák í sær; og tað boðar frá góðum.

# Jú fyrr, tess skjótari kemst á mál

**Ber til at leggja stovnar út um landið, so leingi vit hava so smáar kommunur, at tær ikki hava førleika at umsita útløgd mál**

**Jógvan við Keldu,**
*landsstýrismaður í kommunumálum*



Viknandi grundarlagið undir kommununum úti um landið krevur, at ferð má fáast á samanleggingar í størri øki, so førleikin til at umsita egin mál gerst veruleiki.

Tað eru ov nógvir bæði lands- og kommunupolitikarar sum eru nøgdir við gongdina, sum hon er hvørjari kommunu sær, hóast so gott sum eingin framgongd kemur til sjóndar.

Ofta verður alt ov lætt gingið um, tá politikarar siga, at "vit leggja bara út til kommunurnar", hóast ein og hvør veit, sum kennir støðuna og hugsar seg um, at hava hesar ikki ávísa nøktandi støðd, er eingin møguleiki at umsita. Krøvini til umsitingar økjast og økjast við ferð.

### Er støðan so góð

Er tað nóg mikið at verða nøgdur við, at nøkur grundøki verða útstykkja afturat í einum øki, og førleikakrevjandi arbeiðspláss, mentanar- og sosiala lívið ikki verður víðkað. Ella eitt virki, bert tí hetta skal geva nøkur arbeiðspláss, verður stovnsett, sum kanska ikki ber seg.

Nú hoyra vit ofta kommunupolitikarar siga, at "í okkara kommunu stendur væl til, hon er væl fyri".

Ofta havi eg spurt, hvat hesir meina við. Er tað ein framtíðarkommuna, ella eitt framtíðarøki, sum stendur í stað ella gongur aftur í fólkatali men við einari tryggari bankabók.

### Annað enn góður vilji

Ber til at leggja stovnar út um landið, so leingi vit hava so smáar kommunur, at tær ikki hava førleika til at umsita útløgd mál. Ella kundi ein hugsa sær, at tær stóru kommunurnar umsita teirra útløgdu mál, meðan landið ella tað landsalmenna umsitur málini fyri smærru kommunurnar.

Alt letur seg gera, men henda skipan fer at gera tað nógv dýrari og meiri fløkt. - Tí verður tað heilt einfalt ikki gjørt, ikki tí viljin ikki er til staðar, men hetta er bæði ov kostnaðarmikið og hevur onga meining.

Tað er tí neyðugt at leggja kommunurnar saman í hvørjum øki sær, fyri at fáa sterk umsitingarlig øki.

Bæði lands- og kommunupolitikarar eiga at síggja henda veruleika í eyguni og í felag skorða undir hesa samanleggingargongd. Fyrr hetta verður gjørt, tess skjótari koma vit á mál.

# Ikki pella

**Ólavur Rasmussen**
*í Leirum, 3. oktober 2005*



Mikudagin 14. september svaraði Jógvan á Lakjuni munnligum fyrispurningi á tingi um sjómansprestastarvið í Hull. Á tingsins røðarapalli segði Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, at málið um sjómansprestastarvið var meira fløkt enn onkur vildi gera tað til, tí at kirkjuráðið í Hull eisini gjørdi eina innstilling, tá ið setanin av sjómansprestinum fór fram.

Tað var heilt medvitandi, at undirritaði einki skrivaði um leiklutin hjá Hull í hesum máli. Tað var, fyri at siga sum er, fyri at fáa onkran í felluna. Men eg hevði ikki roknað við, at landsstýrismaðurin í kirkjumálum fór at vera tann fyrsti at detta í hesa fellu.

Sakin er tann, at kirkjusókin í Hull hevur einki kirkjuráð við sjálvstøðugum innstillingarrætti. Sóknin í Hull hevur ein sokallaðan "hoyringarrætt", tá ið sjómansprestur skal setast, men hesin hoyringarrættur hevur ongan myndugleika samanborið við innstillingina, sum verður gjørd. Kirkjusóknin í Hull hevur eina nevnd, sum varðir av grunninum fyri sjómanskirkjuna á staðnum. Tá ið Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður av tingins røðarapalli kallaði hesa nevnd eitt kirkjuráð er hetta heldur ikki í samsvar við sannleikan. Talan er í hvussu so er ikki um eitt vanligt kirkjuráð, tí at øll kirkjuráð í danska ríkinum hava innstillingaræætt, tá ið prestastørv verða sett. Men hetta er, sum sagt, ikki galdandi í Hull.

Eg veit, at landsstýrismaðurin í kirkjumálum ikki medvitandi segði ósatt, tá ið hann svaraði munnliga fyrispurninginum. Onkur hevur ráðgivið honum í hesum máli. Men tað broytir ikki ta sannroynd, at landsstýrismaðurin gav politiska myndugleikanum og Føroya fólki eitt svar, sum í roynd og veru var ein lygn.

Tá ið landsstýrismaðurin samstundis segði, at innstillingin í Hull gjørdi málið fløktari enn onkur vildi vera við, kann eg ikki bara mær atkoma til ta niðurstøðu, at mentamálaráðið hevur valt at yrkja um sannleikar, sum ikki eru til, í staðin fyri at geva skattgjaldaranum veruligt innlit í hvat veruliga fór fram tá ið sjómanspresturin varð settur. Hetta skilji eg væl, tí at málið er ógvuliga greitt, og tolir framvegis ikki dagsins ljós. At tað er neyðugt hjá onkrum at pella prógvar bert, at so er.

Men eg festi framvegis mítt álit á, at landsstýrismaðurin í kirkjumálum sker ígjøgnum, so at nevndin, sum í síni tíð gjørdi álitið, aftur sleppur til verka. At pella seg burturúr hesi suppu ber rætt og slætt ikki til, men elvir bara til at málið júst endar sum ein óbetrandi fløkja.

**NB:** Landsstýrismaðurin segði eisini, at verandi sjómansprestur í Hull var settur í 4 ár. Hetta er heldur ikki sambæriligt við sannleikan. Føroya landsstýri hevur, við verandi sáttmála, bundið seg til 3 ár, t.v.s. til 1. november 2005. At sjómanspresturin hevur ein annan sáttmála við donsku sjómanskirkjuna er ikki okkara borð.